Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Suðuroyar Sjúkrahús og ferðaætlanin hjá Atlantic Airways

Spurningar:

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin – saman við restini av landsstýrinum - at loysa málið við, at læknar og sjúklingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru darvaðir av nýggju ferðaætlanini hjá Atlantic Airways?

Viðmerkingar:
Nýggja ferðaætlanin hjá Atlantic Airways ger, at nógvir suðuroyingar verða darvaðir. Einasta flogfarið úr Danmark leygardag lendir í Vágum kl. 21:10, og Smyril fer av Havnini kl. 21:15. Tað ger, at suðuroyingar megna ikki at koma suður sama dag, sum teir koma heim úr útlondum.

Sunnudag er ferðaætlanin eisini broytt, soleiðis at suðuroyingar ikki náa flogfarið til Danmarkar, sum fer kl. 11:15.

Tað er bæði talan um sjúklingar og læknar á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum verða raktir, umframt ikki so fáar suðuroyingar, sum arbeiða uttanlands.

Hetta kann ávirka sjúklingar, sum hava tað svárt frammanundan, tann skeiva vegin, umframt at útlendskir læknar í Suðuroynni og arbeiðandi suðuroyingar fáa verri treytir at virka eftir.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 10. februar 2022

Bjarni Hammer